# Hví boraði BP ikki djúpri




*Vit síggja tvørskurð av undirgrundini á Williamleiðini. Sum sæst er niðasta "target" niðri á 4.750 metrum. Kort BP*

**Undan boringini kunnaði BP á Oljutinginum um, at tað fór at bora niður á 4.750 metrar. Tá avtornaði varð bert borað niður á 3.350 metrar. Hetta var í tráð við avtaluna við føroyskar myndugleikar segði BP í tíðindaskrivi. Men hví BP ikki boraði djúpri stendur enn ósvarað. Jarðfeingið átti at verið meira opið í hesum máli skrivar Jan Müller í hesi analysuni av Williamboriverkætlanini**

**OLJULEITING / ANALYSA**

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað mundi neyvan koma óvart á flestu av okkum, at Williambrunnurin var turrur. Bíðitíðin gjørdist dekan ov drúgv. Tað líkasum lá í luftini, at her fór ikki at spyrjast tað stóra burtur úr. Fyri tað fyrsta boðaði BP longu frá undan boringini, at her var bert 10% møguleiki at finna nakað. Harnæst varð sett á at bora í ringastu árstíð og vita vit, at veðrið tarnaði arbeiðinum nógv.

Tá brunnar verða boraðir í nýggjum og ókendum øki verða data/upplýsingarnir, ið fáast til vega, oftani eisini brúktir av øllum teimum feløgunum, sum ætla sær at bora í framtíðini. Hesir verða tá kallaðir referansubrunnar. Vitanin, sum fæst sjálvt frá turrum brunnum, er oftani eisini av stórum týdningi fyri myndugleikarnar, eitt nú tá nýggj øki skulu bjóðast út til leiting.

## Stórur spenningur

Tað var tí við stórum spenningi at fylgt varð við, tá BP fór undir boringina og sum tað eisini gjørdi vart við undan boringini – fór at bora niður á 4.750 metra dýpi.

Men tað løgna ella merkisverda hendi, at BP gavst at bora nærum 1.500 metrar longur uppi, nevniliga á 3.350 metrum. At brunnurin var turrur var sjálvandi eitt vónbrot. Men at tað ikki bleiv borað longur niður kom óvart á mong. Munnu ikki hini oljufeløgini, sum hava ætlanir um at bora á landgrunninum, kenna hetta sum ein stóran miss – als ikki at kunna fáa upplýsingar um djúpari løgini, har tey kanska eisini sjálvi skulu til at bora!

Tí er eisini bæði rætt og náttúrligt at spyrja: hvat hevur Williambrunnurin fyri tað fyrsta givið luttakandi oljufeløgunum av vitan og data, og hvat kunnu vit rokna við, at hann fer at geva myndugleikum og øðrum oljufeløgum av vitan og data.

Stóri spurningurin er: Hvat kunnu vit brúka henda sætta brunnin til?

Nú vita vit ikki, hvørjar upplýsingar BP hevur fingið, og helst er felagið ikki liðugt við at evaluera boringina. Vit vita tí heldur ikki, um data frá boringini kunnu koma væl við hjá øðrum, sum ætla at bora á landgrunninum í framtíðini. Men eitt vita vit við vissu, og tað er, at vit fara ikki at fáa nakrar upplýsingar um jarðløgini niðanfyri 3.350 metrar, sum annars sæð varð fram til.

Alt hetta fær okkum at spyrja, hví føroyskir oljumyndugleikar hava gingið við til, at brunnurin "bara" skuldi borast niður á 3.350



*Nú er stóri spurningurin, hvørji oljufeløg eru sinnað til at taka proppin úr Williambrunninum og bora víðari*

*Mynd Jan Müller*